**Karsten Hansen**
**landsstýrismaður**

# Svar

## uppá

## § 52a fyrispurning frá tingmanninum Høgna Hoydal løgtingsmál nr. 42/2013: Fyrispurningur um ætlanina við heilsudeplum og kommunulæknaskipanini kring landið

## Fyrispurningur

1. Hvør er ætlanin við at skipa heilsudeplar kring landið, og nær verður ætlanin sett í verk?
2. Hvar (í hvørjum kommunum, plássum og økjum) verða heilsudeplarnir skipaðir?
3. Er ætlanin, at kommunulæknar, sum nú eru í kommununum og á ymsum plássum, skulu savna síni viðtaluhøli í hesar heilsudeplar?
4. Hvør tekur avgerðirnar, og hvørjar samráðingar hava verið við kommunurnar um hesar ætlanir?
5. Er ætlanin, at landið skal taka yvir avgerðarættin um kommunulæknahølir?
6. Er ætlanin, at landið skal yvirtaka fíggingina og skyldurnar av at útvega hølir og útgerð til kommunulæknar, og verður játtan umbiðin til hetta?
7. Hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar til tess at fremja ætlanirnar?

## Svar

### 1. Hvør er ætlanin við at skipa heilsudeplar kring landið, og nær verður ætlanin sett í verk?

Galdandi kommunulæknaskipan kom í gildi fyrst í 1900-talinum. Síðani tá eru farnar víðfevndar broytingar fram í samfelagnum bæði viðvíkjandi tilboðum um og tørvi á heilsuveitingum. Men hóast víðfevndu broytingarnar, eru bert smávegis tillagingar gjørdar í kommunulæknaskipanini øll hesi árini.

Henda gongdin hevur havt við sær, at kommunulæknaskipanin við tíðini er vorðin støðugt meira ótíðarhóskandi. Tað gerst alsamt meira sjónligt, at øll kommunulæknaskipanin sum hon er, stendur á einum vegamóti, og vandi er fyri, at skipanin fer fyri bakka, um munadygg tiltøk at betra um støðuna ikki verða sett í verk sum skjótast.

Avbjóðingin er tí at fáa eitt heilsuverk, har tænastan til borgaran er í miðdeplinum, samstundis sum avmarkaða starvsfólka- og fíggjarliga tilfeingið verður gagnnýtt skilabetri enn møguleiki er fyri undir galdandi skipan.

Hesi viðurskifti eru viðgjørd í Álitinum um nýggja kommunulæknaskipan og í Heilsunýskipanini. Her verður ført fram, at viðurskiftini á økinum hava við sær, at alstórur tørvur er á at fremja víðfevndar broytingar í galdandi kommunulæknaskipan – og í heilsuverkinum sum heild.

Álitið um nýggja kommunulæknaskipan og Heilsunýskipanin mæla tí til at broyta uppgávubýtið millum teir ymsu partarnar í heilsuverkinum, so viðgerðartilboð í nógv størri mun verða flutt av sjúkrahúsum til tann partin av heilsuverkinum, sum er uttanfyri sjúkrahúsini. Fortreytin fyri, at hetta kann fremjast eftir hesi ætlan er, at landið verður skipað í færri og størri eindir, við hvør sínum heilsudepli. Hesin parturin av heilsuverkinum skal so uppraðfestast munandi til tess at klára at røkja nýggju uppgávurnar.

Ætlanin er, at allar tær kanningar og viðgerðir, sum kunnu fara fram uttanfyri sjúkrahúsini, skulu fara fram á heilsudeplunum. Hetta merkir, at tað á heilsudeplunum fer at verða lagdur dentur á at veita og menna heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tilboð, kanningar og ráðgeving til borgaran. Ætlanin er, at stórur partur av heilsuveitingunum til borgarar við varandi sjúkum og eldri skal kunna fara fram í heilsudeplunum. Til tess at kunna røkja hesar uppgávur, fara á heilsudeplunum at starvast viðkomandi heilsustarvsfólk, t.d. kommunulæknar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingar, kostfrøðingar, farmaseutar, sálarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar og ljósmøður.

Sum tað verður ført fram í Heilsunýskipanini, fer ein slík umskipan at hava við sær, at tað fer at bera til at skipa og samskipa viðgerðartilboðini og gagnnýta orkuna í heilsuverkinum á ein munandi skilabetri hátt, enn gjørligt er undir galdandi skipanum. Sostatt eigur møguleiki at vera fyri at kunna veita enn fleiri viðgerðartilboð innan somu fíggjarkarmar.

Arbeiðið við at samantvinna teir ymsu partarnar í heilsuverkinum, samsvarandi Heilsunýskipanini, er sera víðfevnt og krevur gjølla fyrireiking. Av somu orsøk er hetta eitt arbeiði, sum fer at verða sett í verk í stigum. Strembað verður eftir, at landið verður býtt í heilsuøkir í 2014. Í ár verður somuleiðis farið undir at skipa teir fyrstu heilsudeplarnar, og ætlanin er, at heilsudeplar verða í øllum heilsuøkjum í 2015.

## 2. Hvar (í hvørjum kommunum, plássum og økjum) verða heilsudeplarnir skipaðir?

Føroyar eru skipaðar í 11 læknadømir. Bæði í Álitinum um nýggja kommunulæknaskipan og í Heilsunýskipanini er semjað um, at tað ber ikki til at røkka teimum yvirskipaðu málunum við eini heilsunýskipan við verandi býti í læknadømum, tí tað eru tey alt ov smá til. Ein fortreyt fyri at røkka hesum er, at økini hava eina hóskandi stødd – bæði tá tað snýr seg um fólkagrundarlag og starvsfólkaorku. Við støði í hesum verður mælt til at skipa landið í færri, og størri økir. Álitið um nýggja kommunulæknaskipan mælir til 5 heilsuøkir.

Álitini mæla til, at heilsuøkini verða skipa við hvør sínum heilsudepli. Hetta merkir, at ein heilsudepil verður í hvørjum øki sær, men at tað harumframt kunnu skipast viðtalur í einum ella fleiri viðtaluhølum innanfyri sama heilsuøki.

Politiskt er støða ikki tikin til, hvussu nógv heilsuøkir skulu skipast í Føroyum, og støða er heldur ikki tikin til, hvørjar kommunur skulu hoyra saman í teimum ymsu økjunum. Hvussu heilsuøkini verða skipað, og hvar heilsudeplarnir fara at liggja eru mál, sum Heilsumálaráðið viðgera saman við kommununum. Hetta kemst av, at sambært galdandi skipan eru tað kommunurnar, sum skulu útvega viðtaluhølir.

3. **Er ætlanin, at kommunulæknar, sum nú eru í kommununum og á ymsum plássum, skulu savna síni viðtaluhøli í hesar heilsudeplar?**

Heilsustarvsfólk, sum starvast uttanfyri sjúkrahúsverkið og læknar undir útbúgving hava kunnað Heilsumálaráðið um, at soleiðis sum økið er skipað í dag, hevur tað við sær eitt fakligt einsemi.

Heilsustarvsfólk hava kunnað um, at tey ynskja at vera partur av einum heilsufakligum umhvørvi. Tað ber til at eftirlíka hesum ynski, um so er, at landið verður skipað í heilsuøkir við heilsudeplum. Heilsustarvsfólkini í økjunum, t.d. kommunulæknar, fara tá at hava hesar sum starvsstað. Á henda hátt fara møguleikarnir fyri samstarvi bæði innan og millum teir ymsu bólkarnar av heilsustarvsfólkum at betrast munandi.

4. **Hvør tekur avgerðirnar, og hvørjar samráðingar hava verið við kommunurnar um hesar ætlanir?**

Sambært lógini um kommunulæknaskipanina (løgtingslóg nr. 28. frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan) er tað landsstýrismaðurin, sum setur kommunulæknar í starv, og kommunurnar sum útvega og rinda viðtaluhølir. Sambært sáttmálanum millum Kommunulæknafelagið og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya (Heilsutrygd) skal landsstýrismaðurin góðkenna býtið í læknadømir.

Seinnu árini hava støðugt fleiri kommunur vent sær til skiftandi landsstýrisfólk í heilsumálum viðvíkjandi kommunulæknaviðurskiftunum í teirra øki, og hava tær víst á, at ynskiligt er at fáa skipað viðurskifti, so borgarum í teirra økjum standa í boði dygdargóðar heilsutænastur. Við støði í hesum, eru Heilsumálaráðið og nakrar kommunur farnar undir eitt samstarv, sum fer at hava við sær, at eitt heilsuøkið við heilsudepli verður skipað í næstum. Í komandi mánað fer Heilsumálaráðið at venda sær til onnur økir, sum hava ynskt at fáa eitt samstarv í lag á hesum økinum.

5. **Er ætlanin, at landið skal taka yvir avgerðarættin um kommunulæknahølir?**

Sambært galdandi skipan eru tað kommunurnar, sum hava skyldu til at útvega og bera raksturin av kommunulæknaviðtaluhølunum í læknadømunum.

Spurningurin, um møguligar broytingar eiga at fremjast viðvíkjandi hølisviðurskiftum í teimum komandi heilsuøkjunum, er ikki viðgjørdur politiskt, og tískil er støða ikki tikin hesum viðvíkjandi.

Í Álitinum um nýggja kommunulæknaskipan verður spurningurin, hvørt viðtaluhølini eiga at vera ein kommunal ella ein landsuppgáva, umrøddur. Sambært álitinum er tann skilabesta loysnin, at landið yvirtekur økið.

6. **Er ætlanin, at landið skal yvirtaka fíggingina og skyldurnar av at útvega hølir og útgerð til kommunulæknar, og verður játtan umbiðin til hetta?**

Landsstýrismaðurin metir í síni heild, at tað er skilabest, at játtan og ábyrgd fylgjast at. Í arbeiðinum at seta á stovn heilsudeplar, hevur landsstýrsimaðurin tó ongar ítøkiligar ætlanin um at broyta galdandi skipan viðvíkjandi hølisviðurskiftum hjá kommunulæknum. Tískil fer játtan ikki at verða umbiðin til hetta endamál á hesum sinni.

7. **Hvørjar lógarbroytingar eru neyðugar til tess at fremja ætlanirnar?**

Til ber at fara undir arbeiðið at fremja ætlaðu broytingarnar viðvíkjandi heilsuøkjum og heilsudeplum uttan at fremja lógarbroytingar. Tá ið farið verður undir næstu stigini hesum viðvíkjandi, fer at verða neyðugt at fremja broytingar í lógum og kunngerðum, sum regulera økið. Læknadømini verða broytt við at gera eitt ískoyti til sáttmálan millum Kommunulæknafelag Føroya og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya.

Tórshavn, tann 31. mars 2014

**Karsten Hansen**
landsstýrismaður